# Meðan grísarnir doyggja og eta hvønn annan í donskum flutningsbilum



JENIS AV RANA
Miðfloksins vegna

“ det ved jeg intet om”. - Orðini vóru søgd um føroyskt fiskarí - men kundu hóskandi verið sett sum yvirskrift yvir alla samrøðuna, danski fólkatingsmaðurin hevði við sjónvarpsjournalistin tískvøldið.

Meðan danskir grísar stríðast fyri lívinum, doyggja og eta hvønnannan í donskum flutningsbilum á veg til sláturhús aðrastaðir í Europa, hava Føroyar vitjan úr partlamenti dana. Hesin vitjandi (sb. honum sjálvum einasti humoristiski fundamentalisturin) hevur sum eitt av lívsmálum sínum at nokta óføddum føroyskum børnum mest grundleggjandi demokratiska rættin (sum hann annars sigur seg verja): rættin til lív. Ikki talan um, sb. “demokretinum” Kader - tey skulu sorterast frá eftir sama mynstri, sum gjørt er og verður í móðurlandinum. Vit føringar eru ov góðir av okkum, alt ov mong sleppa at liva, fosturdrápini mugu hækka. Rætturin til lív, (“som er hjerteblod for mig”) er ikki fyri hesi!

Vit mugu bert vóna, at maðurin, gjøgnum upplivingar komandi daganar, ger sær sínar egnu meiningar. Tí hugstoytt er at hoyra so nógvar fordómar, móti einari heilari tjóð, verða borðreiddar av sama persóni í so stuttum práti.

Bestu ráðini til “ vinarliga “ danan munnu verða, at hann finnur sær økir, har tørvurin á hjálpandi hondum er størri enn her hjá okkum. Her virða vit mannalívið, og royna at hjálpa teimum, sum tørva hjálpandi hendur. Í so máta skuldi nokk verið at tikið sær av í Danmark, ikki bert innan djóraheimin, men eisini innan t. d. eldraøkið, viðurskifti innflytara og viðv. harðskap móti homosexuellum - bert fyri at nevna okkurt av tí, donsku fjølmiðlanir borðreiða við dagliga. Fyri ikki at tala um hvat hann kundi fingið burturúr, fór hann út í stóru verøld at finna tey, sum dagliga líða og bøta við lívi sínum, uttan so mikið sum at hava hava hoyrt orðið demokrati nevnt.

# Vær førum nú aftur til landanna

SIGMUND VESTERGAARD
Lesandi

Ónsdagin 28. mars hevði Sonne Smith, fjølmiðlamaður, stutta grein við heitinum ”Uttanlanda í vikuskiftinum” í Sosialinum. Her fýlist Sonne Smith á, at fólk áhaldandi tosa um at fara ”uttanlanda í vikuskiftinum”, fyri at brúka hansara egnu frálíku yvirskrift. Hví er yvirskrift hansara frálík? Jú, tí hon lýsir alla greinina í trimum orðum. Sjáldsamt at síggja so beinrakna yvirskrift.

Nóg mikið um grein Sonna. Tað, sum fekk meg at skriva henda stubba, var hetta við ”uttanlanda” mótvegis ”uttanlands”. Sum flestum kunnugt, so er ”landa” hvørsfalssniðið í fleirtali av orðinum ”land”, og ”lands” hvørsfalssniðið í eintali. Tí verður mælt fólki til at siga ”uttanlands” tá tey eru stødd í øðrum landi enn Føroyum. Við meira ella minni jøvnum millumbilum eru málvinir í bløðunum við slíkum áheitanum á fólk. Tað tykist tó ikki at rína við. Fólk fara enn ”uttanlanda”, heldur enn ”uttanlands”, ið er tað rættara sambært nútíðar føroyskari rættskriving.

Hvør er so orsøkin – ella hvørjar eru orsøkirnar – til at fólk, hóast nógvar áheitanir um tað øvugta, enn siga ”uttanlanda”? Kann hugsast, at føroyingar altíð hava sagt ”uttanlanda” og tí hava ilt við at sleppa hesum, sum summi skíra ein ósið? Eg havi onkra ábending um, at so er.

Ein ábending er í 54. ørindi í frálíka Brókartátti, sum Jógvan uppi í Stovu (d. 1757) úr Leynum yrkti. Har verður sagt (ørindið er skrivað niður eftir S. Egholm (stj.): Nýggja Kvæðabókin 2):

*Saktans høvum vær leingi her*
*úti á sjónum hingið,*
*førum nú aftur til landanna*
*við tí, vær høvum fingið!*

Her fara menn sostatt ”aftur til landanna”. Út frá hesum er nærliggjandi at hugsa, at yrkt verður soleiðis tí føroyingar tá á døgum hava tosað hetta, t.e. ”til landa” ella ”til landanna”.

Nú havi eg ikki kannað hetta aðrastaðni. Tí eri eg varin við at gera ov greiða niðurstøðu út frá hesum eina ørindinum. Kanska er hetta sermerkt fyri kvæði. Tó haldi eg hetta vera vert at hava í huga, tá greiðast skal frá, hví føroyingar flestir fara ”uttanlanda” heldur enn ”uttanlands”. Sjálvur havi eg altíð sagt ”uttanlands”, tí hetta er tað rættara sambært nútímans føroyskari rættskriving. Hóast hetta fari eg ikki at umrøða føroyskt sum eina ”danska sirkusdialekt”.

Eg bíði spentur eftir viðmerking til henda greinarstubban mín. Vónandi hevur onkur fróðarmaður ella -kvinna okkurt birtandi ískast til hesar grundanir mínar.

Við málkvøðu

**TÍÐINDI**

Lions Club Eysturoy:

# Listaframsýning í Runavík á páskum

FRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*

Fyrsta og annan páskadag verður árliga listaframsýningin, sum Lions Club Eysturoy skipar fyri, í Runavíkar skúla. Stevnan verður sett kl.15 av Kára P Højgaard, løgtingsmanni, og eisini fara systrarnar Joan og Morid Simonsen og Bodil Jacobsen at syngja, meðan Petur Súni Jacobsen hevur undirspælið, í samband við setanina,

Við á framsýningini eru, eins og fyrr, umleið 40 listafólk, og sýna hesi eini 2-250 listarverk, ið umfata hópin av list, so sum oljumálningar, vatnlitsmyndir, tekningar, klipp og annað listarligt handverk.

Fyrireikarnir frá Lions Club Eysturoy vóna, at tað verða eins nógv fólk í ár sum vanligt, ið fara at vitja. Eini 800 – 1000 folk plaga at støkka inn á gólvi í Runavíkar skúla, har framsýningin er sett upp.

Sum vanligt fer allur ágóðin til vælgerandi endamál, og í ár hevur Lions Club Eysturoy gjørt av, at ágóðin skal fara til altjóða tiltakið “Sight First 2” ( sjónina fyrst 2 ) hjá Lions Clubbunum.

Hóast Lions Club leingi hevur gjørt ein stóran innsats fyri at hjálpa blindum, so eru ikki færri enn einar 30 milliónir blind í heiminum í dag. Lions hevur í fyrsta umfari innsavnað brillur inn til tey við veikari sjón í áttatiárunum, og í nítiárunum vóru innsavnaðar 150 milliónir US-dollar til skurðviðgerð og aðra hjálp. Fyri árini 2006 – 2009 hevur Lions sett sær sum mál at samla 200 mio dollar fyri tey blindu og hesum málsetningi vænta teir at klára, tí 1 jan. 2007 vóru innsavnaðar 50 mio dollar.

Hesum hjálpiarbeiði hevur Lions Club Eysturoy verið við í, tí í áttatiárunum vóru innsavnaðar ein mongd av brillum, sum vóru framsendar til savningardepilin í Danmark. Í 1992 bleiv helmingurin av ágóðanum frá listaframsýningini latin til hjálpiarbeiðið tá. Í ár vil L.C.Eysturoy eisini nýta høvi til at vera við í hesum altjóða lionstiltaki, og er ágóðin frá páskaframsýningini nú ein kærkomin møguleiki, at stuðla og hjálpa teimum treingjandi við.

Framsýningin er opin báðar páskadagarnar frá kl. 15 til kl. 20.

# Akvarium á Argjum letur upp

**Annan páskadag, mánadagin 9. apríl klokkan 14, letur Føroya Sjósavn upp fyri almenninginum**

FRAMSÝNING

Føroya Sjósavn er fyrsta almenna akvarium í Føroyum, og heldur til í tí sokallaða íshúsinum á Argjum, Rættargøta 1, beint sunnan fyri Sandágerð.

Á savninum eru trý stór akvariu við tilsamans umleið 24 tonsum av sjógvi umframt fleiri smærri akvariu. Í hesum akvarium eru fiskar og alskyns botndjór úr havinum kring Føroyar. Har eru millum annað toskur, hýsa, seiður, hávur, havtaska, rognkelsi, høgguslokkur, fleiri sløg av krabbun, kræklingi, øðu, jákupsskel og mong onnur sløg av botndjórum og vøkstri, íalt umleið 30 fiskasløg umframt skeljadjór, krabbar o.a.

Talið av fiska- og djórasløgum á savninum veksur alsamt. Savnið fær hvørja viku okkurt nýtt fiska- ella djóraslag frá m.ø útróðrarbátum og skipum. Savnið hevur fingið stóra hjálp frá fiskimonnum og øðrum at útvega fisk til savnið.

Sum eina roynd var savnið opið á ólavsøku 2006, hóast alt tá ikki var liðugt. Tað vitjaðu óvæntað nógv fólk teir báðar dagarnar, tilsamans millum tvey og trý túsund fólk.

Fyribils er ætlanin at hava opið hvønn leygardag og sunnudag millum kl. 14 og 18. Seinni verður helst eisini opið mitt í viku.

Umframt at savnið verður opið fyri almenninginum verður møguleiki hjá skúlum, barnagørðum o.ø. at gera avtalu um at vitja á savninum. Eisini er ætlanin, at møguleiki skal vera hjá skúlum at leggja partar av undirvísingini í eitt nú lív- og náttúrufrøði á savninum, har arbeitt verður við at innrætta eina skúlastovu.



*Sjósavnið á Argjum letur upp annan páskadag. Myndin er tikin á ólavsøku*

*Mynd: Rigmor Dam*